# Nøvn

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



# Júst 60

Luttók á rimmar veitsluni hjá Júst á Hotel Føroyum í síðstu viku, nú Júst rundaði tey 60 tann 24.mai. Sum eina tøkk fyri veitsluna og fyri gott vinarlag í fleiri enn 40 ár, fari eg á henda hátt at heilsa bóndanum við nøkrum minnisbrotum.

**Júst, minnist tú**, tá vit spældu borðtennis uppi í Sílagøtu. Tá var einki við at keypa Stiga borð, nei ein spønpláta varð málað grøn, net og bóltar keyptir, og so spældu vit í tronga fýrrúminum, Leivur, tú og eg mangt eitt kvøldi, og satt at siga, tit vórðu bara knáir, sum fráleið.

**Júst, minnist tú** ríðitúrarnar. Leivur á Kambi, tú á Bellu Høj hjá Leif Mohr og eg á Brittu. Vit vóru langar og stuttar túrar, turrar túrar og eisini onkran vátan- veðurlagið er jú soleiðis háttað í Føroyum. Túrin í Sunnara Botn ikki at gloyma, tá rossini rýmdu, meðan vit fingu okkum ein lúr, og Leivur fekk fatur á teimum aftur á Norðradalsskarði? Tó onkran túr fóru vit saman, men komu aftur hvør sær – tað vil so vera.

**Júst, minnist tú** sílatúrarnar. Til tey ymisku vøtnini, við hvørt á rossabaki, men eisini vil bili. Til Kaldbaksbotn, Leynavatn og eisini til Eiðisvatn. Ein túrur til Eiðisvatn, stendur kanska serliga týðiligur. Fóru eftir Oyggjarvegnum, men kjafsvart í mjørka. Komu at koyra aftaná gamla skúlastjóranum, sum allan vegin norðureftir koyrdi á vinstru síðu, so vit sótu við hjartanum í hálsinum og bíðaðu eftir, at tað brast; men so lítil ferðsla var tá, at vit møttu ongum bili heilt til Kollfjarðardal, tá tað aftur klárnaði í. Tá var brúgvin ikki komin yvir Oyrasund, so umborð á eina gamla slupp, sum tá flutti bilar, millum Hósvík og Oyrar. Norður til Eiðisvatn. Hetta var langt áðrenn SEV oyðilegði vatnið. Onkran sílatúrin vóru vit eisini, har neyðugt var at brúka bjargingarvestar.

**Júst, minnist tú**, biltúrin til Leynasand. Tit – Leivur og tú – høvdu lánt bilin, og lovaðu at koyra við skili og ikki dálka hann. Tá tit avhendaðu bilin aftur, var hann bæði reinur og vælvaskaður. Men eg undraðist yvir, at hann var so vátur innan – máti skuldi verða við vaski. Fleiri ár aftaná søgdu tit frá, hvat tykkum var viðurfarist. Á Leynasandi skuldu tit yvir um ánna, men áarførið hevði verið, so áin var stór, so tá tit vóru komnir mitt út í ánna, stóð bilurin fastur. Roynt var at bakka við tí úrsliti, at bilurin sakk enn longur niður, so langt – sambart Júst – at neyðugt var at fara út gjøgnnum vindeyguni. Ja, mangt er at minnast aftur á.

**Júst minnist tú** harutúrin, tá eg fekk flestar harur. Eg fari at yvast. Kann ikki torga, at skjóta haru – og eti hana slettis ikki. Men harumennirnir hjá Júst er ein hópur av áhugaverdur monnum, sum stuttligt er, at verða saman við. Men har eru óskrivaðar reglur. Tú skjýtur helst ikki fleiri harur enn bóndin, so eg var ikki í krithúsinum tann dagin. Vanliga um kvøldi, tá skaffa verður, verður reypa um harutúrar – bóndin førir orðið- men tað kvøldið var hara ikki tikin uppá tungu. Bóndin fór til Grønlands við John Dam.

**Júst er bóndi**. Hevur Húsahaga og nógvu seinastu árini eisini Flatnahaga. Høgligir hagar. Kann koyra við bili til báðar og gjøgnum báðar. Bóndin kennir síni fár, og tey kenna hann. Ger eitt floyt út gjøgnum bilrútin, og áðrenn tú veitst av, stendur ein gonga rundan um bilin. Ómakaleyst, tá gevast skal kraftfóður um veturin.



*Leivur og Júst í nýggjum tjóðbúna á Ólavsøku síðst í 60-árunum*

Havi verið fjallmaður hjá Júst nógvu seinastu árini, saman við øðrum góðum monnum. Tað koma nýggir til av og á, men fáir verða verandi, teir klára ikki mostin. Tú skalt verða húðartjukkur- tola meira enn vanligt. Ikki kropsliga, tí hagin er lagaligur at ganga á fjall- mest undanbrekka. Men sykan fær seg roynda. Tá bóndin í umleið 300 dagar á árinum, bara noyðist at gera eitt floyt, so kemur seyðurin rennandi til hansara, hvussu í víðu verð, skal hann so renna undan, tá fjallgonga er, og bóndin floytar, rópar og geylar, sum eitt svakt. Men hvønn gongur tað útyvir: okkum neyðars fjallmenn. Vit verða húðflongdir. Men ikki veit eg – Júst má hava evnir, sum eingin annar hevur. Tað gongur ein løta, so er alt við tað gamla. Og ikki at gloyma kvøldarnar í seyðahúsinum, tá flett verður- kvøld ein ikki vil verða fyriuttan.

**Júst er ísáðari.** Argasti kappingarneytin hjá tarvinum. Plagi at vera við sum skrivari. Áhugaverdir túrar. Á slíkum ísáðingartúrum verður mangt skald og mong yrkingin tikin til viðgerðar. Tí **Júst er belisin** ella bókamaður, sum tað eitur á føroyskum. Ikki veit eg, nær hann fær tíð at lesa, men hann kann endurgeva brot úr søgubókum og skaldsøgum, og tað eru ikki so fáar yrkingar, hann kann uttanat. Sjálvur er hann ikki sørur yrkjari, og onkran tátt hevur hann eisini staðið faddur at.

Seinastu nógvu árini hevur **Júst verið á skiferðum** í suðurlondum, saman við jetsettinum, sum vit onnur øvundsjúk rópa tey. Har hevur hann nógvar søgurnar frá, men onkra hevur ein hoyrt frá øðrum. Ikki allar er borðbarar, men eina fari eg at tríva í, sum kanska eisini lýsir Júst: Komnir til hotellið, verður ferðalagið býtt upp, tveir og tvær í hvørjum kamari. Komnir inn á kamarið, blaka Júst og hin jetsettarin kuffertið á songina, og pakka út. Í øðrum kuffertinum Lakosta troyggir og skjúrtir, Bjørn Borg undirbuksir og Boss parfuma og eini tvey bunti av pengaseðlum. Júst pakkar út turra grind og turran fisk, spik og annað gott, teir skulu jú hava eitt føroyakvøld á túrinum. Júst hevði kamarið fyri seg sjálvan restina av túrinum. Eg lúgvi, sum mær er logið!

**Júst er frásøgumaður**. Kann í tímavís siga frá túrum og upplivingum í Føroyum, Grønlandi, Tailandi, Tibet, Noreg, Danmark, Eysturríki – you name it, og tú lurtar við andakt. Og røðurnar, hann heldur á hvørjari veitslu, hann luttekur í, eru tiltiknar.

At siga, at **Júst er ruddiligur**, er at lúgva. Ingrid man hava haft sítt toyggj, at taka upp eftir honum, og seta seg í bilin hjá Júst er eitt upplivilsi fyri seg. Seinast fekk eg eina óbrostna patrón upp í endan. Men tá dagurin vanliga hevur ov fáar tímar, fær ruddingin ikki 1.prioritet.

Men **Júst er álitismaður**. Biður tú hann gera eitthvørt fyri teg, so verður tað gjørt, men avtalan skal ikki ganga uppá minuttir ella tímar, tí tað kann ganga dagar, men tað verður gjørt. Og tað er tað týdningamesta.

Tað er mangt annað, ein kundi trivið í, men nóg mikið fyri hesu ferð.

Enn einaferð tillukku við degnum við bestu ynskjum fyri framtíðina.

**27.05.10**
**Helgi B.**

# Russ Taff og Vitin í Badmintonhøllini



*Russ Taff*

Leygarkvøldið 12. juni kl. 21 skipar sangbólkurin Vitin fyri stórum sangtiltaki í Klaksvíkar Badmintonhøll við luttøku av Russ Taff.

Umframt at verða kendur sum einstaklingur, er Russ Taff kendur frá Gaither Vocal Band og Imperials. Russ Taff er í Føroyum í sambandi við upptøku og útgávu av fløgu, og hevur hann í hesum sambandi játtað at luttaka á tiltakinum í Klaksvíkar Badmintonhøll 12. juni.

Undir tiltakinum fara sangbólkurin Vitin og Russ Taff at famføra bæði einsæris og saman umframt at Betesdakórið kemur at stuðla uppundir bæði hjá Vitanum og hjá Russ Taff.

Sambært fyribilsskránna verður tiltakið skipað sum ein blandingur av teim kendu "Syngið við" tiltøkumum hjá Vitanum og eini konsert við Russ Taff. Til sangtiltakið er ókeypis atgongd.